# FSF standard venjarasáttmáli

**MILLUM:**

*Venjari*:

Navn: ....................................................

Bústaður: ....................................................

Føddur: ........................ Tjóðskapur: ............................................

Teldupostur: .................................................... Telefon: ............................................

hereftir nevndur (venjari),

**OG**

*Fótbóltsfelag*:

Navn: ....................................................

Bústaður: ....................................................

V-tal: ....................................................

Hereftir nevnt (felagið).

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: …………………………………………….

Felagnum: ……………………………………………….

Omanfyri nevndu partar hava í dag gjørt fylgjandi venjarasáttmála:

**§ 1. Sáttmálatíðarskeið**

Sáttmálin er galdandi í tíðarskeiðnum:

**frá:** .......................... **til:** ..........................

**§ 2. Arbeiðsstaður, arbeiðstíð og annað arbeiði**

Høvuðsarbeiðsstaður hjá venjaranum er felagshúsið og leikvøllurin hjá felagnum, og annars har sum venjing og dystir fara fram.

*Stk. 2.* Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, alt eftir árstíð og kappingum.

*Stk. 3.* Miðal vikutímatalið í sáttmálatíðarskeiðnum verður mett til ............ tímar.

*Stk. 4.* Hesin sáttmálin avmarkar ikki venjaran at kunna átaka sær annað arbeiði, tó treytað av, at venjarin annars kann lúka treytirnar í hesum sáttmála.

*Stk. 5.* Hóast ásetingina í stk. 4, so kunnu partarnir avtala at venjarin í sáttmálatíðarskeiðnum ikki kann átaka sær annað arbeiði, og um hetta skal vera galdandi, so skal venjarin vátta hetta her við sínari undirskrift:

.....................................................

*Undirskrift venjarans*

**§ 3. Lóggáva**

Partarnir taka undir við, at føroysk lóggáva er galdandi fyri hendan sáttmálan.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: …………………………………………..

Felagnum: ……………………………………………..

## Skyldur venjarans

### § 4. Venjing og dystir

Venjarin skal skipa fyri venjingum og dystum hjá liði/liðum felagsins, ið tekur/taka lut í fylgjandi kapping/kappingum í føroysku lands- og steypakappingini í fótbólti sum Fótbóltssamband Føroya fyriskipar:

..........................................................................

Set inn navn á liði/liðum og kapping/kappingum

, umframt í samband við møguligari luttøku hjá omanfyri nevnda liði/liðum í kappingum uttanlands fyriskipaðar av UEFA.

### § 5. Limaskapur

Venjarin hevur skyldu til at vera limur í felagnum í sáttmálatíðarskeiðnum, og at rinda limagjald.

### § 6. Loyalitetur

Venjarin hevur skyldu til at vera trúgvur ímóti felagnum, og skal ikki mótarbeiða áhugamálum felagsins ella stuðlum felagsins.

### § 7. Avtalað spæl

Venjarin hevur skyldu til ikki at taka lut í avtalaðum spæli.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: …………………………………………….

Felagnum: ……………………………………………….

*Stk. 2.* Hugtakið avtalað spæl sambært stk. 1 er um viðurskifti, tá úrslitið av einum fótbóltsdysti ella umstøðurnar í einum fótbóltsdysti (t.d. tal av hornasparkum, brotssparkum, frísparkum ella tal av gulum ella reyðum kortum) eru avtalað frammanundan ella eru ávirkaði av øðrum áhugamálum enn ítróttarligum.

*Stk. 3.* Venjarin hevur skyldu til beinanvegin at boða Fótbóltssambandi Føroya frá, um hesin fær kunnleika til viðurskifti, ið hava ella hava havt sum endamál, at avtala ella ávirka úrslitið av einum fótbóltsdysti ella umstøðurnar í einum fótbóltsdysti, samsvarandi stk. 1 og 2. Fráboðanir hesum viðvíkjandi kunnu sendast til teldupost: integrity@fsf.fo.

*Stk. 4.* Brot á stk. 1-3 verða revsað sambært § 53 í lógunum hjá Fótbóltssambandi Føroya.

**§ 8. Ítróttavedding og peningaspøl**

Venjarin hevur skyldu til ikki, hvørki beinleiðis ella óbeinleiðis, at taka lut í ítróttavedding ella í peningaspølum viðvíkjandi fótbóltsdystum, har venjarin sjálvur luttekur.

*Stk. 2.* Brot á stk. 1 verða revsað sambært § 53 í lógunum hjá Fótbóltssambandi Føroya.

**§ 9. Luttøka í øðrum ítrótti**

Venjarin skal ikki taka lut í venjing ella fótbóltsdysti hjá øðrum fótbóltsfelagi ella luttaka í øðrum ítróttargreinum sum venjari, uttan so at felagið hevur givið venjaranum skrivligt loyvi til tess.

**§ 10. Reglur hjá felagnum**

Venjarin hevur skyldu til at fylgja teimum reglum, sum felagið hevur samtykt at galda fyri venjarar hjá felagnum, tó mugu hesar reglur ikki stríða ímóti hesum sáttmálanum ella øðrum reglum hjá Fótbóltssambandi Føroya, UEFA ella FIFA, og verða tískil settar til viks um ósamsvar er ímillum nevndu reglur.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: …………………………………………..

Felagnum: ……………………………………………..

**§ 11. Lýsingar**

Venjarin hevur skyldu at nýta búnan hjá felagnum í sambandi við ferðing til og frá dystum, luttøka í tíðindafundum og sjónvarpssamrøðum.

*Stk. 2.* Venjarin skal ikki vera í búna, sum við navni ella búmerki umboðar onnur merki enn tey, sum felagið hevur møguliga stuðulsavtalu við.

*Stk. 3.* Venjarin hevur skyldu til at samstarva við møguligar stuðlar hjá felagnum, og felagið hevur rætt til uttan viðurlag, at geva sínum stuðlum loyvi til at nýta myndir av venjaranum í lýsingum, herundir eisini at nýta navn venjarans. Felagið hevur tó ikki rætt til at nýta myndir av venjaranum, sum kunnu stríða ímóti skyldum hansara mótvegis øðrum arbeiðsgevara.

*Stk. 4.* Venjarin hevur ikki rætt til, uttan skrivligt samtykki frá felagnum, at gera persónligar lýsingar- og stuðulsavtalur.

*Stk. 5.* Hóast ásetingarnar í stk. 1-4, so kann venjarin bera seg undan, at verða nýttur í lýsingum hjá felagnum um hetta stríður ímóti etiskum ella moralskum virðum venjarans ella um myndirnar eru tiknar undir slíkum umstøðum, sum av røttum mugu metast at hoyra til privatlív venjarans, og sum hann av røttum metir ikki eiga at verða vístar alment.

## Skyldur felagsins

**§ 12. Revsiváttan**

Felagið hevur skyldu til at fáa til vega revsiváttan frá Føroya Landfúta, áðrenn starvssetan ella leingjan av starvssetan kann fara fram av venjaranum.

*Stk. 2.* Revsiváttanin sambært stk. 1, skal innihalda upplýsing um viðkomandi venjari er dømdur fyri brot á kapittul 24 í revsilógini um kynslig brotsverk.

*Stk. 3.* Um venjarin noktar at veita felagnum nevndu revsiváttan sambært stk. 1, ella um revsiváttanin inniheldur upplýsing um, at viðkomandi persónur er dømdur fyri brot á kapittul 24 í revsilógini, so hevur felagið skyldu til at tryggja, at venjarin ikki verður settur í starv hjá felagnum ella á annan hátt er knýttur at felagnum.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: …………………………………………..

Felagnum: ……………………………………………..

*Stk. 4.* Felagið hevur skyldu til at varðveita revsiváttanina so leingi sum venjarin er í starvi ella á nakran annan hátt er knýttur at felagnum, og skal felagið útflýggja revsiváttanina til FSF tá biðið verður um hetta, til tess at FSF kann eftirkanna hesa.

*Stk. 5.* Brot á stk. 1 – 4 verða revsað av Aganevnd FSF´s sambært § 53 í lógunum hjá Fótbóltssambandi Føroya.

**§ 13. Ferða- og uppihaldsútreiðslur**

Felagið hevur skyldu til at rinda allar ferða- og uppihaldsútreiðslur hjá venjaranum í samband við útidystir, venjingarlegur ella dystir uttanlands.

**§ 14. Venjarabúni**

Felagið hevur skyldu til, uttan kostnað fyri venjaran, á hvørjum ári at lata venjaranum venjarabúna.

**§ 15. Avrit av reglum hjá felagnum**

Felagið hevur skyldu til at geva venjaranum eitt avrit av viðkomandi reglum felagsins.

**§ 16. Kunning um doping**

Felagið hevur skyldu til á hvørjum ári at kunna venjaran um doping, herundir um hvørji evni eru bannaði sambært dopingyvirlitinum hjá World Anti Doping Agency (WADA).

**§ 17. Løn í samband við sjúku**

Felagið hevur skyldu til at rinda venjaranum løn undir sjúku. Felagið kann krevja venjaranum eftir læknaváttan í hesum sambandi.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: ………………………………………….

Felagnum: …………………………………………….

**§ 18. Lógarkravd arbeiðsskaðatrygging**

Felagið hevur skyldu til at tekna og at rinda fyri lógarkravda arbeiðsskaðatrygging fyri venjaran.

*Stk. 2.* Felagið hevur skyldu til at geva venjaranum avrit av tryggingarskjalinum viðvíkjandi tryggingini í stk. 1.

*Stk. 3.* Felagið váttar, at fylgjandi arbeiðsskaðatrygging er teknað fyri venjaran:

..............................................

*Tryggingarnummar*

**§ 19. Ferðatrygging**

Felagið hevur skyldu til at tekna og at rinda fyri ferðatrygging fyri venjaran í samband við uttanlandsferðir hjá felagnum, har venjarin luttekur.

*Stk. 2.* Felagið hevur skyldu til at geva venjaranum avrit av tryggingarskjalinum og tryggingartreytunum viðvíkjandi tryggingini í stk. 1.

**§ 20. Frítíðarløn**

Felagið veitir venjaranum frítíðarløn sambært reglunum í løgtingslóg um frítíð við løn.

*Stk. 2.* Frítíðin skal leggjast í samráð við felagið, tó uttanfyri tíðarskeiðið, tá ið føroyska steypa- og landskappingin verður leikt, umframt tá lið venjarans tekur lut í UEFA kapping.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: …………………………………………….

Felagnum: ……………………………………………….

## Samsýningar

### § 21. Løn

Partarnir hava avtalað, at felagið rindar venjaranum fylgjandi løn (brutto) (*íroknað pensjónsgjald, men uttan frítíðarløn sambært § 20*), í avtalutíðarskeiðnum:

| |
|---|
| |

*Stk. 2.* Felagið bindur seg til at útgjalda lønina til venjaran mánaðarliga afturút til tann 1. í einum mánað.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: ………………………………………….

Felagnum: ……………………………………………..

## § 22. Bonus

Partarnir hava avtalað, at felagið veitir venjaranum fylgjandi bonus:

| |
|---|
| |

## § 23. Fríir ágóðar

Partarnir hava avtalað, at felagið veitir venjaranum fylgjandi fríu ágóðar:

| *Slag:* | *Skattligt virði í sáttmálatíðarskeiðnum sambært kunngerð frá TAKS:* |
|---|---|
| Frían bil: | ........................................................................................... |
| Fría telefon: | ........................................................................................... |
| Frían bústað: | ........................................................................................... |
| Annað: | ........................................................................................... |

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: ………………………………………….

Felagnum: …………………………………………….

**§ 24. Aðrir ágóðar**

Partarnir hava avtalað, at felagið veitir venjaranum fylgjandi aðrar ágóðar:

| *Slag:* | *Skattligt virði í sáttmálatíðarskeiðnum sambært kunngerð frá TAKS:* |
|---|---|
| .................................. | .......................................................................................... |
| .................................. | .......................................................................................... |
| .................................. | .......................................................................................... |
| .................................. | .......................................................................................... |

## Uppsagnarviðurskifti

**§ 25. Uppsøgn**

Hesin sáttmálin fer úr gildi av sær sjálvum uttan serskilda uppsøgn, tá sáttmálatíðarskeiðið er endað.

*Stk. 2.* Báðir partar kunnu tó siga upp sáttmálan í úrtíð eftir reglunum í § 2 í løgtingslóg um starvsmenn.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: ……………………………………………..

Felagnum: ………………………………………………..

## Ósemjur

### § 26. Gerðarrættur

Allar ósemjur millum partarnar, herundir ósemjur ella mishald um tulking av hesum sáttmála, verða at leggja fyri gerðarrætt við 3 limum, har hvør av pørtunum velur sítt umboð, og hesi bæði velja triðja gerðarrættarlimin. Semjast tey ikki beinanvegin, skulu tey biðja sorinskrivaran um at velja tann triðja gerðarrættarlimin.

Viðvíkjandi málsviðgerðini, málsavgerðini, sakarkostnaði og øðrum viðurskiftum annars verður víst til reglurnar í lógini um gerðarrætt (*anordning nr. 1254 frá 17. november 2015 om ikrafttræden for Færøerne af lov om voldgift*).

## Undirskriftir

### § 27. Váttan

Partarnir vátta við sínari undirskrift, at ein løgfrøðiliga bindandi venjarasáttmáli hervið er gjørdur millum partarnar, og vátta partarnir samstundis:

**at** hesin sáttmálin inniheldur allar tær samsýningar, sum felagið rindar venjaranum fyri sáttmálatíðarskeiðið, og at eingin annar sáttmáli ella ískoyti til hendan sáttmálan fyriliggur millum partarnar, hvørki skrivliga ella munnliga.

**at** felagið letur inn nýggjan venjarasáttmála, undirskrivaður av báðum pørtum, um partarnir semjast um at gera broytingar til sáttmálan.

**at** allar samsýningar frá felagnum til venjaran verða útgoldnar samsvarandi ta til hvørja tíð galdandi skattalóggávu í Føroyum.

**at** partarnir veita samtykki til FSF at eftirkanna revsiváttanina sambært § 12.

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: …………………………………………..

Felagnum: ……………………………………………..

**at** brot á omanfyri nevndu viðurskifti kunnu verða revsað sambært teimum til hvørja tíð galdandi reglum hjá Fótbóltssambandi Føroya.

Dagfesting: ................................

................................................................. ................................................................

*Undirskrift hjá felagnum* *Undirskrift hjá venjaranum*

*(skal hava heimild at binda felagið løgfrøðiliga)*

*Hesin sáttmálin verður at prenta út í 2 eintøkum og undirskrivað av pørtunum. Venjarin varðveitir 1 eintak, felagið varðveitir 1 eintak, og felagið sendir eitt innskannað avrit av undirskrivaða sáttmálanum til Fótbóltssamband Føroya á teldupost: fsf@fsf.fo .*

***Síðan váttað av:***

Venjaranum: ……………………………………………..

Felagnum: ………………………………………………..